LM-099/2023

Annika Petersen Kvígisgøl 67

Fra: Ásmund Lassen <aalassen@hotmail.com>
Sendt: 23. februar 2024 13:23
Til: VMR-Journal
Emne: Gongd í haga.

Takk fyri ein upplýsandi,og sakligan fund, í Klaksvík í gjárkvøldi.
Vit privatpersónar, ið eru góð við okkara vøkru náttúru, og seta stóran prís uppá at kunna fara ein túr útum bøðgarðarnar, ein góðveðursdag, høvdu veri miki takksom, um vit vóru tryggjaði við lóg, so vit ótarna ,og uttan at skulu finna útav, hvør eigur hagan,og hagapartin man møguliga skal ígjøgnum, fyri til dømis at røkka ein fjallatind, uttan at skula ringja til onkran bónda og spyrja um loyvi.
Soleiðis at vit uttan at kenna okkum sum lógbrótara , ekkaleys kunnu ganga ein túr, í haga ella fram við strond, í sátt og semju.
Hin einstaki vanligi Føroyingurin, voldir ikki nækað slit uppá náttúruna
Við vón um skilvísa viðgerð.

Við heilsan
Ásmundur Lassen